átrúnaður

Lagt til rættis: Snorri Brend *snorri@sosialurin.fo*



orðið

## Alt hevur hann gjørt væl

*Mark. 7.37.*



*Hesa vikuna:*
**John S. Myllhamar**

Fyri nøkrum døgum síðani vistu miðlarnir at siga frá, at ein amerikumaður hevur stevnt Guði, tí at hann stóð aftanfyri alla neyð og allar vanlukkur í heiminum.

Nú taka ivaleyst øll hesi tíðindi sum skemt. Men eingin ivi um, at hugsanin um hin ónda Gud býr í mongum mannasinni. Enski heimsspekingurin John Stuart Mill segði einaferð: "Annaðhvørt er Guð kærleiki og ikki alvaldandi, ella er hann alvaldandi og ikki kærleiki, bæði tvey kann hann ikki vera, tí annars hevði sæð øðrvísi út í heiminum enn tað ger".

Men ta er júst gátan við Guði, at hann er bæði tvey. Hin veldigi Guð, ið skapaði alt sára gott, og eisini hin kærleiksfulli Guð, sum oysti sín skapning undir øllum ríkidømi sínum. Hann vildi at vit skuldu liva ævigt inni hjá sær. Har var nóg mikið av øllum.

Guð er ikki tann, ið hevur ført heimin út í óføri. Tað hava vit menniskju gjørt eftir ráðum frá djevlinum. Vit aktaðu hann betri enn vit aktaðu Guð. Vit fingu í yvirflóð í Paradís. Bara eitt einasta tilskilaði Guð sær og sýtti okkum at nema. Tað var fyri at vísa, at hann er Harri og faðir okkara og vit børn hansara. Men hetta eina forboðið kundu vit ikki lata vera við at smakka. Og úrslitið hava vit sæð heilt til hendan dag, tí Guð er eisini sannleiki og stendur við orð sítt.

Men Guð gav kortini sína fyrijáttan, at senda son sín í heimin at bøta fyri syndir okkara, og hvør tann, ið trýr á hann skal ikki glatast, men hava ævigt lív.

# Eitt gott stað til ein felagsskap

**- Felagsskapurin við føroyingar í Eliaskirkjuni hevur sera nógv at týða fyri meg, sigur toftamaðurin, Ovi Magnussen sum lesur gudfrøði í Keypmannahavn**



*- Tann andaligi felagsskapurin hevur alt at siga, sigur Ovi Magnussen á Toftum sum hevur sína føstu gongd í Eliaskirkjuni í Keypmannahavn. Sjálvur verður hann av og á biðin sum talari*
*Mynd: Snorri Brend*

Eftir summarsteðgin í ár byrjaði ungi toftamaðurin lesnað sín á Lærda Háskúlanum í Keypmannahavn, samstundis sum hann fær undirvísing á Dansk Bibel Institut.

Hóast nógv er at lesa og seta seg inn í, ynskir Ove somuleiðis at vera virkin í føroyska arbeiðinum, sum verður gjørt í og út frá Eliaskirkjuni.

- Henda meinigheitin líkist nógv teirri, sum eg komi frá heima á Toftum.

- Her savnast eisini missiónsfólk ymsa staðni frá. Og tað er eisini her at mín umgangskredsur er. Tí eri eg her, sigur hann.

Møti verða hildin hvørt leygarkvøld kl. 19 í hesi kirkjuni á Vesterbrogade. Arbeiðið byrjaði fyri 27 árum síðani.

### Samtala og bøn

Fyri Ova er eingin ivi um, at hetta er eitt sera gott stað fyri trúgvandi føroyingar at savnast í.

Hann hevði hoyrt um arbeiðið í Eliaskirkjuni frá vinfólkum heima í Føroyum og hevði lisið onkra grein um arbeiðið, áðrenn hann sjálvur fór til Danmarkar í lestrarørindum.

- Fyri meg hevur arbeiðið ótrúliga stóran týdning, serliga tí eg nú lesi gudfrøði á universitetinum.

- Har hevur undirvísingin ofta ein heldur kritiskan dám mótvegis Guds orði. Og tí er tað sera týdningarmikið at hava eitt slíkt stað at koma til, har eg kann tosa við onnur og biðja saman við teimum, greiðir Ovi frá.

Hann sær stóran týdning í tí, at trúgvandi ungdómur sum flytur til Danmarkar hevur ein slíkan andaligan felagsskap at savnast í.

- Annars er vandi fyri at tey kunnu glíða út, slær hann fast.

Ovi verður eisini biðin sum talari til tey føroysku møtini. Hann talaði fyri góðum mánaði síðani, og skal aftur tala í november.

## Eliaskirkjan í Keypmannahavn

Endamálið við føroyska arbeiðinum í Eliaskirkjuni er í fyrstu syftu, at boða evangeliið til trúgv á Jesus Krist og at styrkja hin kristna felagsskapin.

Miðað verður eisini eftir at kalla til trúboðan úti og heima, og til sosiala ábyrgd í heimi, kristna felagsskapinum og samfelagnum.

Tey royna at røkka hesum endamáli við at hava møtir, bíbliubólkar, sunnudagsskúla og annað.

# LO-skrivari vil hava biðirúm

Noreg: Fyrstiskrivarin í norsku arbeiðararørsluni, LO, Ellen Stensrud tosar fyri at bønarrúm verða á øllum norskum arbeiðsplássum.

Í rørsluni verður í dag tosað um hesi bønarúmini fyri tey starvsfólkini, ið ynskja tað, eisini kristin fólk.

- Biðirúm eru góð. Eg meini, at slík áttu at verið á einumhvørjum arbeiðsplássi har møguleiki er til tað, og har starvsfólkini seta fram ynski um tað, skrivar Ellen í eini grein í blaðnum "Kristne Arbeidere", sum hon kallar "Jesus í arbeiðslívinum".

- Eg eri sannførd um, at tey sum trúgva uppá ein góðan og rættvíst dømandi Jesus, sum er her fyri okkum, eisini fáa styrki til at tola meiri av teirri høgu ferðini og trýstinum, sum finst í stórum pørtum av arbeiðslívinum, skrivar Ellen.

Hon meinar eisini, at norskir arbeiðstakarar hava brúk fyri tí stuðlinum sum Jesus kann geva á ymiskan hátt.



*- Trúgvin gevur styrki til arbeiðsdagin, sigur Ellen Stensrud*

## Kirkjudagar við viðkomandi evnum

**Miðvágur:** Hvønn fríggjadag í hesum mánaðinum verður Miðvágs kirkja karmur um fleiri áhugaverdar fyrilestrar.

Byrjað verður í kvøld við fyrilestri eftir Jákup Reinert Hansen, har hann fer at røða um Jákup Dahl undir heitinum "Havið sang yvir mær vøgguljóð".

Í næstu viku fer Martin Restorff Jacobsen at greiða frá um ápostolsku fedrarnar. Seinni verður fyrilestur við Ingu P. Dam um kirkjuna í 2007 og við David Johannesen sum tosar um trúbótina í søguligum atliti.

Fyrilestrarnir verða í kirkjuni og byrja kl. 20.

## Profetisk stevna um vikuskiftið



*Larry Randolph verður høvuðstalari á profetisku stevnuni*

**Havn:** Um vikuskiftið verður samkoman Filadelfia í Havn karmurin um eina heyststevnu við eini sera spennandi skrá.

Stevnan byrjar í kvøld og heldur fram til sunnukvøldið við høvuðstalaranum Larry Randolph úr USA.

Sagt verður um Larry, at hann hevur serstøk evni at gera torskildar andaligar sannleikar lættar at fata hjá fólki.

## Syngja í eina heila viku

**Nesvík:** Í heystfrítíðini skipar Heimamissiónin enn einaferð fyri sangskeiði í leguhúsinum í Nesvík.

Hetta er ein vika, har luttakararnir eru saman alla vikuna í einum sangumhvørvi við kórsangi og øðrum sangtiltøkum.

Skeiðið endar við konsert í ítróttarhøllini á Skála leygarkvøldið 20. oktober.